# Evangelist dregur í land

**Trúðarfelagsskapurin Evangelist fer ikki at føra sak ímóti Danmarks Radio, sum leiðarin fyri felagsskapin annars segði við Rás2, at tey fóru at gera. Evangelist heldur tó fast um sínar atfinningar**

EVANGELIST

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Christian Hedegaard*

Í sendingini "21 Søndag" hjá DR1 fyri viku síðani stóð trúðarfelagsskapurin Evangelist stóð fyri skotum. Eftir sendingina segði leiðarin fyri Evangelist, Christian Hedegaard, við Rás2, at tey ætlaðu at føra sak ímóti DR fyri skuldsetingarnar um ágang ímóti børnum.

Í sendingini hjá DR greiddu ónevnd fólk frá ógvusligum upplivingum sum børn, tá ið fólk í Evangelist skuldu reka illar andar úr teimum. Ein sálarfrøðingur helt, at hetta vóru torturlíknandi støður, sum børnini vórðu sett í. Eisini var greitt frá líknandi hendingum í einum øðrum felagsskapi, Faderhuset.

- Hetta er tað mest absurda, sum eg havi hoyrt. Tað er ótrúligt, hvat mann kann verða skuldsettur fyri sum kristin í Danmark, og vit ætla at føra sak ímóti Danmarks Radio, segði Christian Hedegaard við Rás2.

### Hava ráðført seg

Nú boðar Evangelist frá, at tey fara ikki at melda DR. Í einari fráboðan verður sagt, at Evangelist hevur tosað við løgfrøðisligar ráðgevar, og niðurstøðan er, at Evangelist fer ikki at reisa málið hjá løgregluni.

- Men vit halda fast við okkara atfinningar ímóti sendingini, sum samantvinnaði Evangelist við hendingar í Faderhuset, sum vit einki hava vit at gera, sigur Evangelist í fráboðanini.

Í næsta mánaði koma Christian Hedegaard og onnur fólk frá Evangelist til Føroya at halda møtir. Evangelist hevur vitjað reguliga í Føroyum seinastu árini.

- Vit hava nógvar góðar stuðlar, og eg rokni við, at føroyingar fara at stuðla okkum enn meira eftir hetta, tí teir vita, at vit standa fyri tí kristna, segði Christian Hedegaard við Rás2 fyrr í vikuni.

# Amerikanarar keypa meira í Føroyum

**Amerikanarar settu í fjør nýtt met í handlinum við onnur lond. Føroyar stóðu fyri 175 milliónum krónum av handlinum, og tað var munandi meira enn árið fyri**

HANDIL

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Heimasíðan WorldCity hevur gjørt eitt yvirlit yvir samlaða uttanlandshandilin hjá USA í fjør, og talan er um eitt nýtt met.

Amerikanarar keyptu ella seldu fyri umleið 20 billiónir krónur – tað svarar til góðar 2 milliardir krónur um tíman í miðal.

Størsti handilspartnari hjá USA er Kanada, og nummar 2 er Kina. Fremsta norðurland er Svøríki, sum er nummar 34 á listanum.

Føroyar eru nummar 188 á listanum. Samlaði handilin millum Føroyar og USA var í fjør 175 milliónir krónur. Amerikumenn keyptu fyri slakar 93 milliónir krónur úr Føroyum, og føroyingar keyptu fyri 83 milliónir krónur úr USA.

Handilin millum Føroyar og USA vaks við heili 207,7 prosentum í 2008 samanborið við 2007.




NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI 541 705

**Tað er við umhvørvinum sum við veðrinum, øll tosa um tað…**

Á Føroyaprent gera vit meira enn at tosa! Føroyaprent er einasta føroyska virki, ið er góðkent eftir tí Norðurlendska svanamerkinum.

**Vilt tú** tryggja tær, at tínir prentlutir eru framleiddir við umhvørvinum í huga, so prenta teir á einari svanamerktari prentsmiðju.

Vilt tú, at **tíni viðskiftafólk** skulu vita, at tú hugsar um umhvørvið, so lat prentlutirnar vera svanamerktar.

Føroyaprent

www.foroyaprent.fo